## Neyvan vandi her

**Herfyri spurdi Sosialurin Meinhard Eliassen, sum hevur ábyrgdina fyri trygdini, tá borað verður við Føroyar, um nakað er at óttast í Føroyum, nú borurin aftur verður settur í undirgrundina:**

**Hann svaraði: – Tað haldi eg ikki. Tá eitt felag fær loyvi at bora brunnar á føroyskum øki skal felagið gera eina fullfiggjaða váðagreining, har allir vandar verða viðgjørdir. Í tí sambandi skal man tryggja sær, at øll neyðug trygdartiltøk eru tøk. Vit mugu hava í huga, at í okkara øki eru brunnar boraðir í meira enn 30 til 40 ár, tá hugsi eg serstakliga um norska og bretska økið. Okkara krøv eru meinlík teimum, sum verða sett í okkara grannalondum. Á tí økinum kenna vit okkum trygg.**

**–Men ber til at siga, at eingin vandi er til steðar?**

**– Ein fær meg ikki til at siga, at als einki kann henda. Men vit meta, at okkara krøv eins og tað vit vita fyristøðufeløgini gera av forarbeiði tvs. trygdartiltøk tey seta í verk, eru á so høgum støði, at tað er nøktandi fyri tað trygdarsstøði, sum vit hava valt í føroyskum øki.**

# Greenpeace ávarar móti boring á Atlantsmóti

**ÁVARING** Umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace ávarar nú staðiliga móti oljuboringum í Norðsjónum og vestan fyri Hetland.

Jan Müller

Henda ávaring kemur í kjalarvørrinum á dálkingarvanlukkuni í Meksikanska Flógvanum, har oljufelagið BP misti tamarhaldið á oljuframleiðsluni eftir eitt óhapp umborð á einum oljupalli.

Greenpeace sigur í tíðindaskrivi hósdagin, at stórur váði er við at framleiða olju frá oljukeldum vestan fyri Hetland.

Christian Bussau, lívfrøðingur hjá Greenpeace í Týskalandi sigur, at ein oljudálking lík henni í Meksikoflógvanum kann henda í Norðsjónum ella á djúpum vatni vestan fyri Hetland nær tað skal vera ella sum hann málber seg »any time«.

– Vanlukkan í Meksikoflógvanum vísir, at tað ber ikki til at meta um váðan við at framleiða olju offshore. Hann vísir á, at serstakliga stóran váða útgera tey bæði framleiðandi oljuskipini (FPSO) hjá BP vestan fyri Hetland, sum taka upp og goyma oljuna frá Foinaven og Schiehallion keldunum á meira enn 400 metra dýpi.

– Tess djúpri vatn, tess størri er váðin. Um eitt óhapp hendir í hesum umhvørvinum, so fer eingin at kunna koma niður til borihøvdið.

– Kavarar kunnu bara arbeiða á upp til 200 metra dýpi. Um eitt óhapp hendir, so verður fyristøðufelagið noytt til at brúka ómannaðar robottar, sum hava víst seg ikki at kunna brúkast í Meksikanska Flógvanum higartil sigur Bussau frá Greenpeace.

### BP: Góðar royndir her

Ein umboðsmaður fyri BP sigur sambært Shetland News ma.: – Vit hava sera góð hagtøl fyri væleydnaða leiting og framleiðslu á djúpum vatni vestan fyri Hetland. Bæði Foinaven og Schiehallion keldurnar hava verið sera væleydnaðar og hava verið í drift í meira enn 15 ár.

Hann leggur aftrat, at allir upplýsingar og vitan frá óhappinum í Meksikoflógvanum, fara sjálvandi at verða brúkt í bretskum øki eisini.

Stjórin fyri »Oil Spill Prevention and Response Advisory Group« (OSPRAG), Mark McAllister, og stjóri í Fairfield Energy sigur, at einki »well blowout«, óhapp við boring, hevur verið seinastu 20 árini, men

**» Ein oljudálking lík henni í Meksikoflógvanum kann henda í Norðsjónum ella á djúpum vatni vestan fyri Hetland, nær tað skal vera**

GREENPEACE



tíðin er kortini komin til at endurskoða allar skipanir í hesum sambandi.

Greenpeace skuldsetur eisini oljuídnaðin til at halda fram við at dálka umhvørvið við at koyra oljuvatn í havið. Sambært eini kanning, sum OSPAR, ein felagsskapur, sum hevur til uppgávu at verja umhvørvi á sjónum í norður og eystara partinum av Atlantshavi, gjørdi í 20017, so fóru umleið 10.000 tons av olju í havið í Norðsjónum.

Greenpeace sigur víðari, at kanningar úr luftini, sum felagsskapurin hevur gjørt, vísa, at olja sæst á havyvirflatuni rundan um fleiri av oljupallunum í Norðsjónum.

Amerikanska stjórnin hevur annars eftir stóru dálkivanlukkuna steðgað øllum boring við amerikonsku strendurnar í hesum árinum.

*jan@sosialurin*

# Oljudálking í USA ongar avleiðingar fyri boring við Føroyar



*Meinhard Eliassen: – Royndir og lærdómur úr øðrum londum hava stóran týdning og eru við til at hækka trygdarstøðið á okkara leiðum.*

**BORING** Á okkara leiðum eru hundraðtals brunnar boraðir á djúpum vatni seinastu 30 árini og mett er, at trygdarstøðið hevur verið og er forsvarligt. Jarðfeingi hevur tí, eins og myndugleikarnir í Noreg og Bretlandi, ikki sett í verk strangari trygdarkrøv til borivirksemi í økinum.

Jan Müller

Hetta sigur Meinhard Eliassen hjá Jarðfeingi, nú USA og Kanada fyribils hava sett forboð fyri boring og nú Greenpeace ávarar móti at bora um okkara leiðir.

Uppá fyrispurning um líknandi vanlukka kann henda um okkara leiðir og um munur er á lóggávu, trygdarkrøvum og tilbúgvingarviðurskiftum í Føroyum og USA sigur hann, at tey fylgja væl við hendingini í USA, og tað sama gera myndugleikar í okkara grannalondum, sum tey hava tætt samarbeiði við, tí okkara lóggáva og trygdarkrøv eru meinlík teirra.

Royndir og lærdómur úr øðrum londum hava stóran týdning og eru við til at hækka trygdarstøðið á okkara leiðum. Eisini verður kravt av loyvishavarum á føroyskum øki, at teir alla tíðina eftirmeta, bøta um og framhaldandi menna eina trygdarmentan fyri at varðveita eitt forsvarligt heilsutrygdar og umhvørvisstøði sigur Meinhard Eliassen.

Hann leggur aftrat, at fyristøðufeløg í Føroyum skulu, tá tey søkja um boriloyvi, prógva og skjalfesta, at nøktandi tilbúgvingarætlanir eru gjørdar, at basingarútgerð er tøk, og at allar tryggingar og avtalur í hesum sambandi eru í lagi. Eisini skulu tær vera fíggjarliga væl fyri at átaka sær uppgávuna.

Í Føroyum er basingarútgerð tøk, sum kann verja strendur og firðir, tá olja fer á sjógv inni við land. Havast má í huga, at tað sjálvdan og nærum er ógjørligt at nýta basingarútgerð á staðnum, har borað verður á opnum havi. Alda, streymur og vindur gera tað nærum ógjørligt.

*jan@sosialurin.fo*